# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

# WÜRTH messa á Hjalla

**Fakmessa verður á Hjalla í komandi viku. Talan er um eina serliga framsýning, sum fyritøkan Würth Føroyar skipar fyri. Vit vilja við hesum sýna fram nakað av tí, sum vit hava at bjóða, sigur Claus Christensen frá Würth Føroyum**

FRAMSÝNING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í døgunum 25. til 27. oktober skipar Würth Føroyar fyri fakmessu í virkisbygninginum á Hjalla 6 í Hoyvík. Bygningurin har verkstaðurin hjá Strandferðsluni fyrr helt til.

Claus Christensen frá Würth Føroyum sigur, at teir við hesum fara at sýna fram nakað av tí úrvali, sum teir hava at bjóða til tær fýra høvuðsvinnurnar: Auto, metal, el og træ. Á messuni verður útgerð til bilverkstøð, motorsúkkluverkstøð, entreprenørar, maskinverkstøð, smiðjur, elektrikarar, installatørar, radio og sjónvarpsverkstøð, timburmenn, snikkarar, múrarar, og málarar v.m. Hetta er fyrsta framsýning av sínum slagi í Føroyum.

Würth er ein týsk fyritøka, sum varð stovnað í 1945 av Adolf Würth. Tá hesin doyði í 1954, tók sonurin Reinhold Würth yvir. Würth vaks skjótt til eina stóra heimsumfatandi konsern, sum í dag hevur 379 feløg í 85 londum við tilsamans 60.000 starvsfólkum og einum árligum umsetningi upp á umleið 60 milliardir krónur.




*Würth Føroyar skipa fyri fakmessu á Hjalla í døgunum 25.-27. oktober*

### Í Føroyum síðan 1998

Í 1965 varð dótturfelagið Würth Danmark A/S sett á stovn. Würth hevur havt umboð í Føroyum síðan 1998, tá Claus Christensen, sum hevði arbeitt hjá Würth Danmark síðan 1994, flutti heim aftur at búgva. Áðrenn tað ferðaðist hann til Føroya sum sølumaður hjá Würth.




*Claus Christensen frá Würth Føroyum framman fyri framsýningarbygninginum á Hjalla*

Í 2006 varð Würth Føroyar sett á stovn.

Í dag eru tveir sølumenn í Føroyum, Claus Christensen og Bernhard Jacobsen, sum báðir ferðast kring landið og vitja fyritøkur.

Würth hevur eitt tað størsta vøruúrvali á marknaðinum av t.d. amboðum, el-og luftamboðum, kemiskum produktum, goymsluskipanum, verndarútgerð, skrúvum og boltum og mangt annað til el, metal, HVS, træ og bilbransjuna.

Claus Christensen sigur, at í sambandi við messuna hava teir nøkur sera góð messutilboð. Messan er opin hósdagin 25. og fríggjadag 26. oktober frá kl. 10 til 18, og leygardagin 27. oktober frá kl. 11 til 16.

---



*Geir Wardum og Jákup á Borg frá Sp/f Bilrøkt*

Sp/f Bilrøkt :

# Vetrarklárgering og ókeypis olju

**Sp/f Bilrøkt bjóðar seg í hesum døgum fram til at vetrarklárgera bilar, eins og at skifta dekk. Í hesum sambandi bjóða teir øllum sum keypa nýggj dekk at fáa ókeypis oljuskift**

TÍÐINDASKRIV

Veturin stendur fyri durum, og bileigarar mugu gera sínar bilar vetrarklárar fyri at standa seg í tí nógvu ferðsluni við sera ymiskum koyrilíkindum.

Sp/f Bilrøkt hevur spesialiserað seg í at slípa, polera, reinsa og lakkforsegla bilar, so teir síggja út sum spildurnýggir – gjøgnumført reinir og blankir uttan og innan.

Umframt tað er fyritøkan eisini ein dekksøla við mekaniskum verkstaði til smærri umvælingar so sum oljuskift, dekkskift og balansering. Verkstaðurin er útgjørdur við nútímans dekk- og balanseringsmaskinum, og teir skaffa øll sløg av dekkum.

Í sambandi við at fyrsti píkadagur var týsdagin 16. oktober, fáa øll sum keypa fýra nýggj dekk frá Bilrøkt ókeypis olju og oljuskift.

Geir Wardum og Jákup á Borg frá Bilrøkt siga, at teir eisini bjóða eitt pakkatilboð, har teir kanna dekk, olju, ljós, sprinklaravesku og viskarabløð. Eisini verða t. d. gummilistar millum hurðarnar smurdir, og rútarnir verða nanoforseglaðir, so kavi og frost ikki sita so fast á rútunum.

Meira fæst at vita á heimasíðuni: www.bilrokt.fo ella við at venda sær til Sp/f Bilrøkt, Pedda við Steingøta 26, tel. 588880.